# Miðvikan

## Müllerættin:

# Rasmus Müller flutti rýpur úr Grønlandi til Føroyar

**Vit høvdu fyrr í ár eina drúgva røð í Miðvikuni um Müllerættina í Havn. Henda røðin var grundað á brøv, sum vóru fingin úr skiftinum hjá Poul Müller í Grønlandi. Eftir at umrøða í hesi røð eru Poul sjálvur og beiggin Rasmus, synir H.C. Müller, gamla sýslumannin í Havn**

**10. partur**

Vit hava longu havt níggju partar í hesi røð, sum eisini hevur umrøtt Evensen fólkið. Umframt hetta hava verið fleiri greinir um ættina í røðini Hendur ið Sleptu, so tilsamans er talan um fitt av tilfari um hesa ætt, og tað kundi uttan iva verið munandi meira. Helst verður eisini meira sagt frá um vinnuliga partin hjá Müllermonnunum í komandi bindum av Havnarsøgu.

Hetta er eisini eitt íkast til føroyska søgu í Grønlandi. Rasmus Müller var eins og beiggin Poul og svágurin (Grønlands) Johan Joensen kolonistjóri í Grønlandi. Hetta var undan okkara fiskivinnusøgu í Grønlandi, sum er væl lýst.

Tað mest sjónliga minnið um Rasmus er bók »Vildtet og Jagten i Sydgrønland,« sum hann skrivaði lidna í 1899. Hetta er ein bók upp á heilar 519 síður, har hann í einum 40 kapitlum við nógvum myndum skrivar um tey ymsu fuglasløgini, kópasløgini og djórasløgini í Grønlandi. Bókin finst í einum eintaki á Landsbókasavninum, og kann ikki lænast heim. Nøkur eintøk eru tó hjá ættarfólki í Havn.

### Gott samband við grønlendingar

Rasmus hevur verið umrøddur í hesi greinarøð í samband við hini systkini. Men okkurt er at leggja afturat. Henning Scheel, sum kendi Rasmus, sigur m.a. frá:



*Rasmus kom allan vegin úr Grønlandi til Føroyar við rýpum, sum hann ætlaði at fáa sett við her. Hetta er eitt rýpupar*

Kolonibestyrer Rasmus Müller var fra 1875 til nogle år efter århundredskiftet blevet bestyrer af så at sige alle de daværende kolonier i Sydgrønland. Han havde et udmærket forhold til grønlænderne i hvis jagtudflugter han deltog med liv og sjæl og altid på lige fod med grønlænderne. Under rensdyrjagterne veg han ikke tilbage for de store strabadser, der ofte måtte til med hensyn til lange anstrengende vandringer i det vanskelige terræn. Han tog sin del af byrderne, sov i telt sammen med dem og delte deres spartanske levevis.

Efter hans hjemkomst til Danmark, havde jeg den glæde at træffe Müller og lære ham at kende som den ivrige jæger han var. Vit var et par gange på jagt sammen. Men jeg tror nok, at det pinte ham, at han ikki kunde dyrke jagten herhjemme på samme fri og ubundne måde, som han havde kunnet det i Grønland.

I 1906 udgav Müller sin bog »Vildtet og Jagten i Sydgrønland.« Dette er en udmærket skildring af de forekommende vildarter fra Kap Farvel til Nordre Strømfjord. Bogen rummer et væld af gode iagttagelser og oplysninger om udbredelsen af og jagten på de forskellige arter.

På Lehn-Schiølers ornithologiske ekspedition til Vestgrønland i 1925 støttede vi os ofte til Müllers oplysninger f.eks. om, hvor vi skulde søge hen for at træffe forskellige andearter såsom islandsk hvinand, strømand, kongeedderfugl og andre, samt gode lokaliteter med rigt fugleliv, og oplysningerne passede endnu den gang til »punkt og prikke.« Bogen står således som et varigt minde om Rasmus Müller.

Men også på andre områder gjorde han sig bemærket som en dygtig og foretagssom mand.

### Søgan um rýpurnar

Her hugsar Henning Schell millum annað um royndirnar at fáa grønlendskar rýpur at trívast í Føroyum. Pápi hansara hevði eisini roynt hetta við íslendskum rýpum, uttan at tað hevði riggað.

Tað skuldi verið nærum ómøguligt at flutt rýpur úr Grønlandi til Føroyar orsakað av frástøðuni. Men hetta var ikki nakar trupulleiki fyri Rasmus Müller, sum kendi liviháttin hjá rýpum. Á ferðini til Keypmannahavnar var hann sjálvur við, og hann passaði sjálvur rýpurnar, so tær skuldu koma fram í góðum standi.

Í umrøddu bók greiðir Rasmus gjølla frá, hvussu hann slapp undan teimum mistøkum, onnur høvdu gjørt. Royndirnar byrjaðu í mars 1890. Fyrst og fremst var tað í samband við fóðring av rýpunum, at hann mátti royna seg fram.

Hann hevði látið fangað ellivu pør av rýpum, men tað vísti seg, at tær vóru sera illa fyri, tá ið hann fekk tær. Hann mátti royna seg fram við fóðring. Fyrst fóðraði hann tær við lyngi. Tær vildu bert eta »toppskotini«. Tað eydnaðist at halda lív í teimum, men tær vóru framvegis rak. Hetta skilti Rasmus ikki, tí tær ótu við stórum matarlysti. Hetta bendi á, at tað manglaði onkur vitamin, sum mann ikki kendi so nógv til tá. Hann royndi so at fáa tær at eta havragrýn, bygggrýn og ertur men uttan úrslit,

Tað næsta at royna var fuglafræ, sum rýpurnar eftir nøkrum døgum fóru at eta við góðum matarlysti. Hetta var loysnin. Tað var tó ikki nógv av slíkum fræi í koloniini, so Rasmus blandaði fræið við bygg, og hetta riggaði framvegis væl.

Ein annar trupulleiki var at fáa rýpurnar at drekka vatn úr eini



Hr. Dampskibsekspeditör S.E. Müller med hjertelig Hilsen fra hans Broder R. Müller

R. MÜLLER:

VILDTET OG JAGTEN I SYDGRØNLAND

UDGIVET MED UNDERSTØTTELSE AF CARLSBERGFONDEN

H. HAGERUPS BOGHANDEL · KØBENHAVN
HOVEDKOMM. FOR NORGE: H. ASCHEHOUG & CO.
MCMVI

*Fremsta minnið um Rasmus Müller er henda bókin, sum kom út í 1906. Hetta eintakið hevur hann sent beiggjanum við innskriftini: Hr. Dampskibsekspeditør S.E. Müller med hjertelig Hilsen fra hans Broder R. Müller*

skál. Hetta vildu tær ikki vita av. So royndi hann við kavamolum í vatninum. Hetta riggaði, men kava kundi hann ikki rokna við undir eini langari sjóferð. Men sum frá leið gjørdist óneyðugt við kavanum.

Síðan gjørdi Rasmus tveir kassar at hava rýpurnar í á sjóferðini. Tær skuldu hava tað gott á ferðini, so kassarnir fingu smáar hillar til lyng, eins og til mat og vatn til allan túrin, so tað slapst undan at opna kassarnar.

Hetta gekk alt væl, og fuglarnir trivust enntá so væl, at teir byrjaðu at para seg, meðan teir enn vóru í Keypmannahavn.

Tað lá so væl fyri, at rýpurnar kundu koma víðari við skipi til Føroya einar tveir dagar eftir, at teir vóru komnir til Danmarkar.

Tí vóru rýpurnar sera væl fyri,